# All That Rain fær tjaldið at kóka

**Rockbólkurin All That Rain fer at spæla til dans í stóra tjaldinum á Summar Festivalinum. Bólkurin spælir bæði tónleik hjá sær sjálvum og tónleik hjá øðrum**

SUMMAR FESTIVALUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*All That Rain spælir til stóra dansin í tjaldinum á Summar Festivalinum. Leygarkvøldið fara Eyðun & Terji at spæla*

Bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið verður dansur í stóra tjaldinum á Summar Festivalinum.

Fríggjakvøldið verður tað vælumtókti rockbólkurin All That Rain, ið fer at spæla.

All That Rain hevur seks ár á baki, og hesi árini hava teir spælt til eina ørgrynnu av tiltøkum, og bólkurin hevur eisini givið tónleik út á fløgu.

All That Rain hevði sín uppruna í bólkinum Kjølar, sum gavst at spæla í 1999. Manningin í bólkinum hevur skift nakað, men Henning Nicodemussen og Jens Tummas Næss hava øll árini syrgt fyri einum góðum og tryggum botni í bólkinum.

Nú er Rókur Jákupsson sangari í bólkinum, og hann hevur veruliga megnað at lagt nakað afturat tónleikinum hjá All That Rain. Afturat teimum er eisin gittarspælarin Johan Ziskason við til framførsluna á Summar Festivalinum.

All That Rain spældi til dans í tjaldinum á festivalinum í fjør, og hesa uppgávuna skulu teir loysa aftur í ár. Bólkurin kann spæla eina fjølbroytta skrá av sangum – bæði sangir hjá sær sjálvum og hjá øðrum – og tað fara fólk eisini at hoyra á Summar Festivalinum í ár. All That Rain spælir til dansin fríggjakvøldið.

### Eyðun & Terji leygarkvøld

Leygarkvøldið verða tað Eyðun & Terji, sum fara at spæla til dansin í tjaldinum.

Tað vóru fleiri, ið hildu, at tann besta framførslan á Summar Festivalinum í fjør var tann, sum Eyðun & Terji høvdu í stóra festivaltjaldinum. Teir báðir popparnir vóru í stórformi og høvdu eina framúr góða framførslu.

Eyðun Nolsøe og Terji Rasmussen teljast millum teir bestu føroysku sangskrivararnar nakrantíð. Báðir hava tað til felags, at teir skriva frálíkan tónleik, og so duga teir eisini framúr væl at syngja og spæla live.

Teir hava skrivað sangir til sín sjálvs og bólkar sum Frændur, Føstufressar og Moirae, og eftir teir liggja perlur sum Mítt Land, Eros, Flýggi til tónleikin, 80'ini og nógvir aðrir framúr góðir sangir.

Seinnu árini hava Eyðun & Terji spælt nógv saman, og á Summar Festivalinum í ár ber aftur til at hoyra teir live, og teir lova eitt ordans brak.

# Danskir tungvektarar seta dám á festivalin

**Peter Thorup er á odda fyri vælsvingandi bluestrio, sum fer at spæla fyri gestunum á Summar Festialinum**

SUMMAR FESTIVALUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eru tríggir garvaðir og sera dugnaligir danskir tónleikarar, sum spæla í bólkinum Thorup, Backhausen og Friis. Teir brúka bluestónleik sum grundarlag, og blues hevur í nógv ár verið við í tí mesta, sum teir takast við.

Peter Thorup verður mettur sum ein av bestu donsku bluessangarum, og í 2004 varð hann heiðraður sum Ársins Bluesnavn. Thorup er eisini kendur frá 60'ara bólkinum Beefeaters, og hann hevur eisini samstarvað við Alexis Corner, CCS og Poul Dissing.

### Sterk trio

Thor Backhausen er ein meistari, tá ið hann letur sínar fingar dansar á orgli, klaveri ella harmonika. Hann hevur verið nógv brúktur sum sutiotónleikari á útgávum hjá eitt nú Lone Kellerman, Rockbandet og Anne Dorthe Michelsen.

Michael Friis er bassistur, og hann hevur verið virkin í donskum tónleiki síðani 1970'ini. Hann spælir tráleysan 5-streingjaðan bassgittar, og tað hevur altíð syrgt fyri einum sermerktum ljóði. Hann hevur spælt við eitt nú Lis Sørensen, Sebastian, Kasper Winding, Erann DD og Paul Banks.

Hetta eru tríggir tungvektarar í donskum tónleiki, sum hava funnið saman í eina sterka og sera vælspælandi trio.



*Peter Thorup, sum verður mettur sum ein av bestu donsku bluessangarum, er á odda fyri einari bluestrio, ið fer at spæla á Summar Festivalinum*

## Anfinn ætlar at seta lív í

Anfinn Nielsen er ein av stóru hittmakarunum í Føroyum. Hann er sangari og sangskrivari í bólkinum Anfinn & Co., og við sagnum sum Sirkus Tinganes, Í Skúrið, Gubbi og eg, Útsalg og Lítli Fuglur hevur hann sligið navnið hjá sær rimmarfast í føroyskum tónleiki.

Bólkurin Anfinn & Co. hevur ikki spælt við upprunaligu manningini í nógv, nógv ár, men á Summar Festivalinum gera teir comeback. Og stendur tað til oddamannin í bólkinum, skal tað vera eitt comeback við lít.

- Til ein tílíkan festival skal tað vera ferð á, og tí hava vit so at siga bert valt sangir av villara slagnum, sigur Anfinn Nielsen, sum heldur sína uppgávu á pallinum fyrst og fremst vera at seta lív í fjøldina.

Anfinn Nielsen hevur í meira enn 30 ár skrivað sangir, sum ein fyri og annar eftir er blivin eitt hitt í Føroyum. Nógvir av sangunum hjá honum hava ein lættan og skemtiligan tóna.

Anfinn Nielsen er føddur og uppvaksin í Klaksvík og fór sum so mangur annar til skips longu sum 13 ára gamal. Umborð á skipum hevur hann skrivað nógvar av sínum sangum, og longu í 1972 yrkti hann sangin um Sundaberg, sum gekk burtur.

Í 1985 fekk bólkurin Science Fiction eitt risahitt við sanginum Í skúrið (sangurin um húkin), og hendan sangin hevði Anfinn Nielsen skrivað til bólkin.

Nakað seinni fór Anfinn sjálvur at geva tónleik út. Nú kallaði hann seg Anfinn & Co., og við góðari hjálp frá Karl Martin Samuelsen og øðrum góðum kreftum úr Hjarnum kom bandið Hví. Sangirnir av bandunum rungaðu kring alt landið, og bandið seldi óføra væl. Meira enn 5000 eintøk vóru seld, og tað er púra óhoyrt nú á døgum.

Nøkur ár seinni svaraði Anfinn sjálvur spurningum, og tá kom útgávan Tí. Í 1999 kom higartil seinasta útgávan hjá Anfinni, og hon kallast Betur seint enn álvara.

**-mørk**